# BÓKASAVNSVIÐURSKIFTINI

# Á

# VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLUNUM

**ÁLIT**

skrivað av arbeiðsbólki settur av

Undirvísingar- og Mentamálastýrinum

13. apríl 2000

**Tórshavn**
**2000**

-8 OKT. 2003
SKR. T. 44/00 8
MÁL. T. 012138

**Innihald**

Inngangur 3
Arbeiðssetningurin 4
Bókasavnsskipanin í landinum í løtuni 5
Verandi bókasavnsskipan á vinnu- og miðnámsskúlunum 6
Bókasavnstænasta 7
Px2 – ella tann ítøkiligi tørvurin 8
Ynski skúlans og framtíðarætlanir 9
Felags telduskráseting, felags føroysk leitingar- og lániskipan. Rationalisering av útláninum 10
Okkara boð 13
Hvussu kunnu broytingarnar fremjast? 13
Tíðarætlan og uppskot um broytingar í skipanini 14
Kostnaðarætlan 15
Eftirútbúgving av skúlabókavørðum 15
Nýbyggingar og umbyggingar 16
Niðurstøða og tilmæli 16
Skjøl 18-30

# Bókasavnsviðurskiftini á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum

## Inngangur

Í brævi dagf. 13. apríl 2000 boðaði Undirvísingar- og Mentamálastýrið frá, at tað hevur sett ein arbeiðsbólk, "ið skal kanna bókasavnsviðurskiftini á vinnu- og miðnámsskúlunum og gera uppskot um, hvussu hesi viðurskifti kunnu skipast við atliti at tørvi brúkarans og framtíðarmenning."

Í arbeiðsbólkinum hava sitið:
Bo Warberg, lærari, Føroya Handilsskúli
Hendrik Dahl, lærari, Føroya Studentaskúli og HF-skeið
Óli Olsen, fyrrverandi lærari, Føroya Sjómansskúli
Claus Reistrup, undirvísingarleiðari, Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Jákup Thorsteinsson, samskipari, Undirvísingar- og Mentamálastýrið, skrivari
Martin Næs, landsbókavørður, Føroya Landsbókasavn, formaður

Harumframt hevur Mortan Hentze Christensen, bókavørður, Føroya Landsbókasavn, tikið lut í fundarvirkseminum sum eygleiðari

Arbeiðsbólkurin hevur havt 9 fundir og vil við hesum handa Undirvísingar- og Mentamálastýrinum hjálagda álit um bókasavnsviðurskiftini á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum. Víst verður í hesum sambandi til bræv, dagf. 4/7-2000 frá arbeiðsbólkinum til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, (Skjal 1,b)

Í Savnshúsunum á Debesartrøð
1. september 2000

| | |
|---|---|
| Bo Warberg | Hendrik Dahl |
| Óli Olsen | Claus Reistrup |
| Jákup Thorsteinsson<br>skrivari | Martin Næs<br>formaður |

*Arbeiðssetningurin*

"Til tess at tryggja eina góða og tíðarhóskandi atgongd til bókasavn/miðlasavn á øllum vinnu- og miðnámsskúlum og í nærumhvørvinum hjá hesum skúlum, verður við hesum settur ein arbeiðsbólkur, ið skal kanna verandi bókasavnsviðurskifti og gera uppskot um framtíðarhóskandi broytingar í verandi skipan, serliga við atliti at nýtslu av nýtøkni.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum er at

1. kanna
   hvussu verandi bókasavnsskipan virkar á øllum vinnu- og miðnámsskúlum
   ítøkiliga tørvin á teimum ymsu skúlunum
   hvørji ynski skúlarnir hava í løtuni
   hvat teir ymsu skúlarnir hugsa um framtíðina innan bókasavnstænastu
   hvussu ein felags telduskrásetan kann gerast
   hvussu ein felags føroysk leitanar- og lániskipan kann skipast
   møguleikar fyri rationalisering av útláninum, t.d. kort við grindlum til allar næmingar,

2. meta um
   tørvin á sakkønari hjálp, bæði við atliti at verandi skipan og við nýtslu av nýggjastu kunningartøknini á økinum,

3. áseta
   minstukrøv til nútímans bókasavnstænastu á vinnu- og miðnámsskúlunum við støði í kanningini,

4. gera uppskot um
   hvussu broytingar kunnu fremjast, gera tíðarætlan fyri broytingar og skrásetan av bókum, umframt eina kostnaðarætlan" (Skjal 1,a)

Viðmerkjast skal beinanvegin, at arbeiðsbólkurin í ávísum førum kendi seg noyddan at fara út um arbeiðssetningin. Hetta var neyðugt til tess at koma við einum so fullfíggjaðum áliti sum gjørligt.

Av tí at tað hesi seinnu árini, hjá hægri skúlum og stovnum, hevur verið ein alsamt vaksandi áhugi fyri skipaðum bókasavnsviðurskiftum, hevur Føroya Landsbókasavn á fjórða ári havt ein bókavørð í starvi, hvørs uppgáva er at skráseta og *gera* bókasøvn fyri hægri skúlar og almennar stovnar. Uppskotið frá formanninum um at víðka arbeiðsbólkin við einum eygleiðara, sum kennir hesi viðurskifti í praksis, varð samtykt. Frá 2. fundi hevur Mortan Hentze Christensen, bókavørður, luttikið í fundarvirkseminum.

*Bókasavnsskipanin í landinum í løtuni*

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er av týdningi at vísa á støðuna sum heild á bókasavnsøkinum í landinum í løtuni.

Við heimastýrislógini varð bókasavnsmálið yvirtikið sum føroyskt sermál, og Føroya Landsbókasavn, stovnað í 1828 sum sjálvsognarstovnur, kom undir landsstýrið og virkar í dag eftir løgtingslóg frá 1952.

Í 1968 varð á fyrsta sinni samtykt lóg um fólkabókasøvn. Í hesi lóg vórðu fleiri bókasavnsskyldur og – uppgávur álagdar Føroya Landsbókasavni at loysa í samstarvi við fólkabókasøvnini. Henda lógin varð í 1988 sett úr gildi, tí tá varð samtykt nýggj lóg fyri økið: Løgtingslóg fyri megin-, fólka- og skúlabókasøvn.

Í lógini frá 1988 verða nógvar av teimum skyldum og uppgávum, sum fyrr vóru álagdar landsbókasavninum, lutvíst fluttar yvir á meginbókasøvnini og lutvíst yvir á nýggjan stovn, Bókastovuna, sum eftir grein 11 í lógini skuldi setast á stovn undir leiðslu av einum bókasavnsstjóra.

Orsakað av teirri fíggjarligu støðuni, sum kom í í landinum fyrst í níti-árunum, eru partar av 1988-lógini ongantíð settir í verk, og í stuttum hevur hetta havt tað við sær, at partar av lógini als ikki virka, og aðrir virka so dánt. Hetta er óheppið, serliga í eini tíð, har menningin á KT-økinum hevur havt so stóran týdning - eisini fyri menningina innan alla bókasavnsskipanina. Úrslitið av hesum er tað, at Føroya Landsbókasavn er gliðið út úr lógini løgfrøðiliga, men ikki í verki, tí landsstýrið hevur álagt landsbókavørðinum at røkja uppgávurnar hjá bókasavnsstjóranum, so leingi hesin ikki er settur.

Ein av høvuðsorsøkunum til nýggju bókasavnslógina í 1988 var tann, at landsbókasavnið skuldi gerast leyst av fólkabókasavnsarbeiðinum og skuldi savna seg um uppgávuna sum tjóð- og vísindabókasavn. – Hetta eru uppgávur, sum eingin annar, hvørki í Føroyum ella aðrastaðni, tekur sær av, og tí er ómetaliga umráðandi, at hetta verður gjørt. At hetta arbeiðið verður gjørt so væl sum gjørligt, kemur øllum samfelagnum til góðar, eisini teimum sum eru næmingar ella lærarar í føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum.

Í mentanarálitinum *Avmarkaður marknaður* (1996) stendur m.a. um bókasøvn á hægri skúlum:

"At skúlabókasøvn – eins og onnur bókasøvn – eru neyðug, er óneyðugt at skriva her, men á landsbókasavninum (og eisini í býarbókasavninum) hava vit nú í langa tíð kent sviðan av, at tann almenna skúlabókasavnsskipanin bara fevnir um tann føroyska *fólkaskúlan.* Ymsa staðni í landinum eru nú so nógvir aðrir – hægri – skúlar, sum hava skúlabókasøvn fyri neyðini, men hesir eru eftir lógini sleptir upp á fjall. Her verður eisini neyðugt at broyta hugburð og endurskoða lógargrundarlagið..." (bls. 152).

Námsfrøðiliga gongdin seinnu árini hevur lagt størri og størri trýst á Føroya Landsbókasavn, Býarbókasavnið og á bókasøvnini á teimum miðnámsskúlum, ið hava eitt, og hava hesi bókasøvnini als ikki nøktað tørvin. Normal- ella heimaflokkurin er enn til, men ein vaksandi partur av skúlaarbeiðinum er verkætlanir og størri uppgávur, har næmingarnir í alt størri mun arbeiða stakir

ella í smærri bólkum. Nógv av hesum arbeiði fer eisini fram uttan fyri vanliga skúlatíð. Alt hetta setur serlig krøv til 'gamla' bókasavnið – betri pláss við individuellum arbeiðsplássum við teldum, ið hava atgongd til internet osfr. Helst eigur eisini at verða hugsað um øðrvísi upplatingartíðir.

Arbeiðsbólkurin er sannførdur um, at skal undirvísingin á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum lúka nútímans undirvísingarkrøv, er eisini neyðugt við nútímans skúlabókasøvnum á hesum skúlum. Til tess at tryggja, at hesi viðurskifti koma í rætt lag, er neyðugt við einum lógargrundarlagi á økinum, sum áleggur myndugleikunum at skipa fyri skúlabókasavnstænastu á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum. Hetta lógargrundarlagið vantar púra í skipanini í dag, og tí verður mestsum bara arbeitt fram eftir fummum á økinum.

*Verandi bókasavnsskipan á vinnu- og miðnámsskúlunum*

Greitt er, at verandi bókasavnsskipan á vinnu- og miðnámsskúlunum als ikki kann fáa áteknningina: nútímans.
Allir skúlarnir hava bøkur, men tað er ikki tað sama sum, at allir skúlarnir hava bókasøvn, og uppaftur minni er talan um nútímans bókasøvn. Í hesum føri skal orðið *bókasavn* lesast sum eitt savn av bókum/tilfari, ið er skrásett og frágingið á slíkan hátt, at tað kann koma fleiri persónum (næmingum/lærarum) at gagni, og at savnið er skipað soleiðis, at tað á skjótan og ómakaleysan hátt kann koma so mongum at gagni sum gjørligt.

Fyrsta punktið í arbeiðssetninginum var at kanna støðuna í dag. Hetta varð gjørt á tann hátt, at gjørt varð eitt spurnarblað, ið sent varð øllum 14 vinnu- og miðnámsskúlunum í landinum (Skjal, 2). Spurningarnir skuldu svarast skrivliga. Av teimum 14 skúlunum svaraðu 12 aftur. Tann vitan og tann kunnleiki, limirnir í arbeiðsbólkinum frammanundan hava um evnið saman við innkomnum svarum frá spurnarblaðnum (Skjal 3,a), eru grundarlagið undir tí, ið her verður skrivað.

Kanning okkara vísir, at runt roknað eru tilsamans uml. 60.000 bøkur á øllum skúlunum. Stórt spurnartekin verður sett við talið, tí royndirnar, landsbókasavnið hevur á hesum øki, eru tær, at tá ið farið verður eftir bunkunum at skráseta og viðgera teir, er ikki óvanligt, at bókanøgdin veksur í stórum.

*Bókasavnstænasta*

Í dag er bókasavnstænasta so nógv meira enn bara bøkur. Og skúlabókasavnstænasta ikki um at tala. Her koma serliga inn í myndina nýggir undirvísingarhættir við nýggjum undirvísingaramboðum. Hetta hevur við sær, at heilt onnur krøv verða sett, ikki bara til tað innihaldsliga í einum skúlabókasavni, men eisini til teir fysisku karmarnar í einum nútímans skúlabókasavni, enn gjørt varð bara fyri nøkrum heilt fáum árum síðan.

Tá ið tosað verður um tíðarhóskandi bókasøvn í dag, verður ikki bara hugsað um atgeingi til bøkur og møguleikan at læna tær. Elektronisku leitimøguleikarnir gera, at tú sum lánari hevur nógv lættari og betri atgongd til skrásett tilfar – bæði úti og heima. Tú kanst leita í pørtum av bókum og tíðarritum, og í mongum førum kanst tú bíleggja tekstin beint av skíggjanum. Hesin møguleikin ger, at annað tilfar sum t.d. tíðarrit, fløgur, filmar, tónleikur og internetatgongd, er ein natúrligur partur av innihaldinum á bókasøvnunum. V.ø.o. skal eisini hugsast heilt øðrvísi um teir fysisku karmarnar, tí nú eru ikki bara hillar, borð og stólar at hugsa um. Hugsast má eisini um at útvega lánarunum/brúkarunum aðrar arbeiðsumstøður enn tær vanligu, so at teir fáa veruligt gagn av teimum tilboðum, bókasøvnini kunnu veita. Her verður serliga hugsað um: amboð, útgerð og starvsfólk, sum kunnu veita fakligan kunnleika um bókasavnstænastuna, og her verður hugsað um ta fysisku plaseringina av bókasavninum í umhvørvinum sum heild, og í skúlanum serstakliga. - Tíðin er vissuliga runnin frá tí hugburði, at bókasavnið kann liggja uppi í einum avlopsrúmi úti undir vaðingini, niðri í kjallaranum ímillum kustar og spannir, ella saman við serundirvísingini inni í teirri gomlu skúlastovuni. Nú føroyska samfelagið, sum tað er at fegnast um, hevur sett sær fyri at veita vinnu- og miðnámsskúlunum eina líkinda bókasavnstænastu, mugu vit staðfesta, at vit mugu taka annað skinn um bak, skulu vit nøkta tann bókasavnstørv, hesar útbúgvingar krevja.

Í hesum sambandi eigur eisini at verða hugsað um, hvør støðan í veruleikanum er á bókasavnsøkinum í dag, og spurningar, sum eiga at umhugsast, eru:

Hvar hava vit skúlarnar, ið treingja til ábøturnar?
Hvar hava vit fólkabókasøvn, ið møguliga kunnu taka lut í einum bókasavns/skúlabókasavnssamstarvi?
Hvørji eru tey fólka/skúlabókasøvnini, ið kunnu víðkast bæði innihaldsliga, og tá ið tað snýr seg um fermetrar?

Til tess at lýsa hetta við nøkrum dømum úr veruleikanum, kundi t.d. verið nevnt, at tað mátti verið sjálvsagt:

- at Vágs bókasavn, Vágs skúli og Miðnámsskúlin í Suðuroy gingu saman um eitt stórt og gott fólka/skúlabókasavn,
- at Klaksvíkar bókasavn skipaði fyri tí bókasavnstekniska partinum av útbygginging av vinnu- og miðnámsskúlunum í Klaksvík, ~~at~~ umhugsað varð at skipa eitt stórt og gott vinnu- og miðnámsskúlabókasavn har í býnum, ístaðin fyri at skipa fyri nógvum smáum bókasøvnum í hvørjum skúla sær,
- at Handilsskúlin á Kambsdali og Studentaskúlin á Kambsdali slóu seg saman um eitt stórt og gott skúlabókasavn, sum varð skipað í tættum samstarvi við Fuglafjarðar bókasavn,

- at Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, Vestmanna bókasavn og Vestmanna skúli funnu saman í eitt bókasavn, sum tænti bæði Fiskivinnuskúlanum, Vestmanna skúla og fólkinum í Vestmanna.

Skal slíkt samstarv bera til, krevur hetta sjálvandi, at virkandi bókasøvnini hava tann neyðuga fakliga førleikan. Her verður bæði hugsað um bókavørðir og lærarar. Í løtuni eru bara yrkisútbúnir bókavørðir starvandi í Havnini og í Klaksvík, men fleiri eru á veg. Harumframt eru tað fleiri av lærarunum, ið starvast við skúlabókasøvnini á vinnu- og miðnámsskúlunum, ið hava fleiri árs royndir á økinum, so her skuldi borið til at fingið eitt gevandi samstarv í lag.

Samstarvið, sum í dag er ímillum Føroya Landsbókasavn og fólka- og skúlabókasøvnini, ella tað samstarvið, sum er ímillum býarbókasavnið og skúlabókasøvnini í Havnini, kundi verið brúkt sum eitt slag av fyrimynd. Við at útbygt hesa fyrimyndina, soleiðis at hon eisini fevndi um vinnu- og miðnámsskúlarnar og fólkabókasøvnini/landsbókasavnið, høvdu vit komið nærri ein heildarloysn á bókasavnsøkinum í Føroyum.

*Px2 - ella tann ítøkiligi tørvurin*

Á teimum ymisku skúlunum kann tann ítøkiligi tørvurin býtast í tvey, ella matematiskt sagt: p x 2 = peningur og pláss.

Her verður sjálvandi fyrst av øllum hugsað um skúlarnar, men høvdu tey virkandi fólka- og skúlabókasøvnini havt nóg mikið av *px2*, so høvdu viðurskiftini í vinnu- og miðnámsskúlunum av sær sjálvum sæð øðrvísi út. Í mong, mong ár hevur alt ov nógv orka verið brúkt upp á at leita eftir peningi, sum í mongum førum kortini ikki var at finna. Tí, høvdu hesi bókasøvnini til fullnar livað eftir teirri lóg, ið er galdandi á økinum, so hevði tað verið lættari at útbygt bókasavnsskipanina í vinnu- og miðnámsskúlunum.

Eitt er vist, og tað er, at teldur taka pláss, og hædd má takast fyri hesum í framtíðar skúlabókasavnsumhvørvinum í landsins vinnu- og miðnámsskúlum.

Peningur má setast av, so til ber at keypa bøkur/tilfar til bókasøvnini og at fáa tilfarið viðgjørt og skrásett. Peningur má eisini setast av til røkt og viðlíkahald av bókasavninum. Verður hetta ikki gjørt, skalt tú ikki droyma um at hava eitt bókasavn í einum skúla. Vit hava alt ov mong dømi um – eisini í Føroyum – at leiðslur eru farnar eftir bókasavninum undir trýsti og hava hugsað sum so, nú hava tey fingið 100.000 kr. at gera bókasavn fyri – *og tigið so*. Slíkur arbeiðsháttur kann ikki brúkast.

Eitt bókasavn er skipað í fleiri pørtum:

1. stovnanin av bókasavninum,
2. dagliga umsitingin av bókasavninum,
3. viðlíkahaldið av bókasavninum (tað er m.a. keyp av nýggjum tilfari og burturkoyring av gomlum),
4. fylgja við í menningini á (skúla)bókasavnsøkinum,
5. luttøka í útvegan og skráseting av egnaðum tilfari, ið kann koma okkara umhvørvi og lánarum at gagni,
6. fylgja við og menna bókasavnið á KT-økinum,
7. eftirútbúgving av bókavørðum/lærarum.

Allir hesir tættir eru umráðandi, og teir eru tengdir hvør at øðrum. Tí kann ikki vera talan um bara at menna ein av hesum tættum. Skal bókasavnið virka, er neyðugt at virkað verður eftir øllum hesum pørtum, um ikki samstundis, so innan fyri ávísar fíggjarligar og fakligar karmar.

Uttaneftir fáa vit so nógv borið upp í hendurnar við at sláa á knappaborðið og (í nógvum førum) við at gjalda fyri tænastuna.

Tað eru nógv tekin, ið benda á, at ein hugburðsbroyting skal til hjá leiðslunum, tá ið tað snýr seg um bókasavnstænastuna í skúlunum, og tann játtandi myndugleikin má ásanna, at her er ein tørvur, sum vinnu- og miðnámsskúlarnir sum er als ikki nøkta.

*Ynski skúlans og framtíðarætlanir*

Við at lesa kanningina, arbeiðsbólkurin hevur latið gjørt, sæst á øllum brøgdum, at skúlabókasøvn á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum eru sum ein óviti, ið øll vilja vera góð við, tá ið hann er góður í sær, men fer hann at grenja, so vil eingin hava nakað við hann at gera.
Kanningin vísir, at næstan allir skúlarnir ynskja at fáa betri hølisviðurskifti og meiri pening at keypa bøkur og amboð fyri.

Teir vilja fegnir hava eitt størri úrval av bókum/tilfari, hetta hevur við sær eitt ynski um meira pláss. Ynski verða eisini sett fram um meira pláss til arbeiðsbólkar, til námsverkstað, til longri upplatingartíðir, at fáa bókastovnarnar edv-skrásettar, at fáa útbúnar bókavørðir at starvast, at bókasavnið gerst miðdepil fyri mongu verkætlanum skúlans. Tað er týðiligt, at yvirhøvur hava skúlabókasøvnini ongan góðan, og tí flýtur alt meira ella minni. Sum er, verður peningur brúktur at keypa bøkur fyri, men hetta er mestsum av handahógvi, og íløgan kemur ikki til sín fulla rætt. Als ikki. Tí metir arbeiðsbólkurin, at svarini í kanningini eru heldur ørkymlandi..Leitað verður í frustratión eftir svarum, og tann einfaldasta niðurstøðan at gera, er at siga, at tað vantar peningur.

Satt er, at peningur vantar og hevur vantað, men sannleikin er tann, at her má eisini ein hugburðsbroyting til, ein øðrvísi tankagongd um nútímans undirvísing og um uppfatanina av einum nútímans bókasavni í hesum sambandinum. Tað ber t.d. ikki til at ringja til eina fyritøku og bíleggja eitt bókasavn til mánadagin 18. august, kl. 08. So einfalt er málið ikki. Ein fyritøka kann vera við at

skapa teir fysisku karmarnar, vilja vit gjalda fyri tað. Og vilja vit hava eitt brúkiligt innihald, so má eisini gjaldast fyri tað. Hetta er hugburðsbroytingin, sum allar leiðslur mugu skilja. Einki bókasavn er komið upp at standa, sjálvt um har eru komin bæði hillar, borð og teldur. Tað skal meira til. Fyrst og fremst ein ásannan av, at skúlabókasavnið er og verður eitt neyðugt amboð í undirvísingini. Ein ásannan av, at ein skúli uttan eitt skúlabókasavn er sum eitt seglskip uttan segl. Ikki fyrr enn hesi viðurskifti eru greinað og greidd, kanst tú fara at tosa um framburð.

Eftir svarunum í kanningini at døma eru øllum avvarðandi greitt, at neyðugt er at gera broytingar, soleiðis at lærarar og næmingar í framtíðini fáa betri umstøður at arbeiða undir, soleiðis at tá ið avtornar, fær samfelagið í síni heild ein nógv betri ágóða av okkara vinnu- og miðnámsskúlaskipan.

*Felags telduskráseting, felags føroysk leitingar- og lánískipan. Rationalisering av útláninum.*

Til eru í dag nógv ymisk sløg av bókasavnsskráum. Nógvar teirra eru skipaðar eftir tí sokallaða marc-sniðinum, t.e. at tær í grundsjónarmiðinum eru bygdar upp eftir sama leisti. Í grannalondum okkara eru útviklað serstøk sløg av marc-útgávuni. Danir hava eina, teir kalla *danmarc*, finnar *finmarc*, norðmenn *normarc*, íslendingar *ismarc* osfr. Tað er ikki óvanligt, at tú í stórum londum hevur fleiri sløg av edv-skráum á bókasøvnunum. Tær kunnu vera ymiskar í útsjónd og støðd og dygd, men felags fyri tær flestu (og bestu) er, at tær eru gjørdar eftir marc-sniðinum. Hvat slag av skrá, tú velur, velst sjálvandi um, hvat slag av bókasavni tú hevur við at gera, hvussu fíggjarstøðan er, og hvussu væl koyrandi man er fakliga.

Tá ið Føroya Landsbókasavn fyri skjótt 10 árum síðan valdi bókasavnsskrá, mátti fyrilit takast av ymiskum slag: fyrst og fremst fíggjarliga orkan, men støddin av søvnum, tær ymisku uppgávurnar og tann fakligi førleikin spældu eisini nógv inn.

Fyri valinum varð norska skráin Mikromarc, (Skjal 3,b). Upprunaliga var tað norski bókavarðaskúlin, sum saman við Universitetsbókasavninum í Oslo, gjørdi hesa skránna, og sum menti hana ta fyrstu tíðina. Seinni yvirtók fyritøkan Norsk Systemutvikling ábyrgdina av at menna og dagføra skránna. Skráin verður í dag nógv brúkt í smærri bókasøvnum, í fólka- og skúlabókasøvnum og eisini í nógvum skúlabókasøvnum í vinnu- og miðnámsskúlum - serliga í Noregi, men eisini í Danmark, Íslandi, Týsklandi og aðrastaðni.

Mikromarcurin er skipaður í ymiskar partar:

1. Skrásetingarpartur
2. Leitipartur
3. Útlánspartur
4. Innkeyps- og tíðarritspartur.

Í teimum ymisku pørtunum eru innbygdar tær ymisku uppgávurnar. Eitt av endamálunum við einari felagsskrá fyri alt landið er, at lánarin sum í sínari tíð fekk eitt lánarakort í hondina, tá ið hon var barn á Strondum, skal kunna brúka sama lánarakortið, tá ið hon fer at ganga á Handilsskúlanum á Kambsdali ella á Fróðskaparsetrinum í Havn, og hetta kortið eigur hon eisini at kunna brúka, tá ið hon kemur inn á okkurt av hinum bókasøvnunum í landinum. – Hetta kunnu vit, tí at vit hava eitt og sama kervið í øllum landinum.

Bókasavnstænastan á vinnu- og miðnámsskúlunum skal í framtíðini eisini síggjast við allari menningini á KT-økinum í huga. Minstukrøv mugu setast til teir fysisku karmarnar, so sum støðd á bókasavni í mun til støðd av skúla, innrætting, plasering í bygninginum, reglugerðir fyri starvsfólk, lán og brúk av tilfari og útgerð. Í sambandi við støðd verður ikki bara hugsað um fermetrar, men eisini innihaldsliga: Hvat skal eitt bókasavn í einum føroyskum vinnu- og miðnámsskúla hava av bókum og útgerð sum grundstovn?

Orsøkin, til at Føroya Landsbókasavn valdi hesa skránna, var fyrst og fremst tann, at her var ein skrá gjørd til bókasavnsbrúk, hon varð gjørd av bókasavnsfólki og teknikarum, ið kendu til tørvin á bókasavnsøkinum. Hon varð og *verður* dagførd alla tíðina, hon var ikki so kostnaðarmikil, hon var lutfalsliga løtt at brúka, og, um vit ynsktu tað, kundu vit í eini handavending leggja um til eina aðra skrá seinni – uttan tó at gera alt tað grundleggjandi arbeiðið umaftur.

Í fyrstani var alt samskiftið við Norsk Systemutvikling í Oslo, men seinni í níti-árunum var deild sett á stovn í Keypmannahavn, og tað er hagar, ið leitað verður í dag eftir sakkunnleika, tá ið hetta er neyðugt.

Føroya Landsbókasavn hevur týtt ta almennu brúkarasíðuna av Mikromarcinum til føroyskt og roynt verður allatíðina at laga hann til føroysk viðurskifti, so talan er um eina føroyska útgávu av marc-sniðinum – ein *farmarc* -.

Henda bókasavnsskráin er nú løgd inn í øll skúla- og bygdabókasøvnini í landinum – 25 í tali. Harumframt eru tað fleiri stovnar og nakrir hægri skúlar, sum longu hava fingið skipanina lagda inn og eru farnir at arbeiða við hesari telduskipanini. – At øll bókasøvnini í Føroyum brúka somu skipan, ger tað munandi lættari at arbeiða við einari felags telduskráseting í landsins bókasøvnum.

Í landsbókasavninum og í býarbókasavninum hevur verið roynt at lagt doyin á at læra starvsfólkini at brúka skránna, t.e. at skráseta í henni. Høvuðsparturin av bókastovnunum á báðum bókasøvnunum er lagdur inn í skipanina, og í dag kann, um internetið, leitast inni á báðum bókasøvnunum. Av tí at skipanin er tann sama, nýtist brúkaranum ikki at seta seg inn í fleiri leitiskipanir – hetta er avgjørt – og í allar mátar - ein stórur fyrimunir í einum lítlum landi sum Føroyum.

Sum áður nevnt hevur Føroya Landsbókasavn nú á fjórða ári eina skipan við einum bókavørði, sum átekur sær at skráseta og "gera" bókasøvn úti á ymiskum almennum stovnum og hægri skúlum, ein sokallað *stovnstænasta*. Harumframt hevur Føroya Landsbókasavn samstarv við Fróðskarpasetrið um bókasavnstænastuna á Setrinum. Tankin við hesari samskrásetingini er tann, at tá ið avtornar, skalt tú sum brúkari kunna sláa upp einastaðni og síggja, hvørjar bøkur eru t.d. í Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, í Føroya Handilsskúla, í Fíggjarmálastýrinum, í Jarðfrøðissavninum, í Sjúkrasystraskúlanum, hjá Skógrøkt Landsins, í Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð, á Fróðskaparsetrinum, í Listasavni Føroya umframt í Lands- og Býarbókasavninum og í øllum hinum

bókasøvnunum í landinum. Til ber longu í dag, um internetið, at leita í nøkrum av hesum 'útigrunnum'. Vísast kann í hesum sambandi til heimasíðurnar hjá ávíkavist landsbókasavninum: www.flb.fo og ta hjá býarbókasavninum www.byarbok.fo

Nevndin er av teirri fatan, at fleiri av hesum vinnu- og miðnámsskúlabókasøvnunum framyvir kunnu fáa status sum fakbókasøvn, og tey kunnu á tann hátt virka sum stuðlar hjá eitt nú landsbókasavninum og býarbókasavninum. Í hesum liggja uttan iva sparimøguleikar, tí søvnini sleppa lættari undan dupultkeypi og øðrum peningakrevjandi dupultvirksemi. Sum dømi um hetta kunnu nevnast:

Føroya Handilsskúli, bókmentir innan handil og búskap
Teknisku skúlarnir, bókmentir innan tað tekniska fakið
Føroya Sjómansskúli, nautiskar bókmentir
Listasavn Føroyar, bókmentir innan málningalist
osfr.

Fyrimunir við hesari skipanini eru, at vit fáa nøkur kvalitetsøvn í landinum.

Í hesum viðfangi koma vit inn á lánisamstarv ímillum bókasøvn. Tað er eyðsæð, at tá ið alt nú verður skrásett út í æsir, so má næsta stigið verða, at gjørd verður ein nærri reglugerð um, hvussu og í hvønn mun tilfarið er lættast atkomiligt hjá lánarunum/brúkarunum – og um hvussu lánisamstarvið ímillum bókasøvnini í landinum verður samskipað í framtíðini. Í hesum sambandi er tað av týdningi, at skúlabókasøvnini sjálv gera eina nærri reglugerð um, hvussu bókasavnið skal brúkast á staðnum, hvør skal brúka tað, nær og hvussu, og um tilfarið kann lænast. Samstarvsavtalur um lán av bókum/tilfari eiga eisini at fáast í lag ímillum eitt nú landsbókasavnið/býarbókasavnið og tey einstøku vinnu- og miðnámsskúlabókasøvnini. – Í grundini er skrásetingin í mikromarcinum og øll tøknin í sambandi við hana so neyv og framkomin, at talan í veruleikanum er um eitt *sjálvtøkubókasavn*, har lánarin lænir bøkurnar sjálvur. Men hetta er eisini nakað, ið tað einstaka bókasavnið sjálvt ger av. Hetta er, umframt at vera ein álitisspurningur, eisini ein spuringur um broyting í mannagongd og vanabundnum hugburði. Men tekniskt er møguleikin til staðar, tá ið bókasavnið er edv-skrásett.

*Okkara boð*

- Eitt bókasavn í órøkt er verri enn ilt!
Tí er okkara boð upp á eina felags telduskráseting, at vit brúka sama leistin sum Føroya Landsbókasavn higartil hevur brúkt, men at hann verður útbygdur. Tað, sum skal til, er í fyrsta umfari:

1. - at tað við lóg ella kunngerð ella reglugerð og pengum verður álagt myndugleikunum at skipa fyri, at nútímans skúlabókasøvn verða fyriskipað í øllum vinnu- og miðnámsskúlum í landinum. Her eigur dentur at verða lagdur á, at eitt nútímans skúlabókasavn er meira enn bøkur, at tað eisini snýr seg um eitt miðlasavn, ein verkstað hjá bæði lærarum og næmingum, eitt stað har kunningartøknin hevur fest sínar røtur, og har pláss má gerast fyri teimum,

2. – at tað við lóg ella kunngerð ella reglugerð verður álagt skúlaleiðslunum, at skúlabókasøvnini verða rikin fakliga og pedagogiskt forsvarligt,

3. - at útbúnir bókavørðir skipa fyri at gera tað grundleggjandi arbeiðið við skráseting av bókastovninum og samskiftinum við ta almennu bókasavnsskipanina, og at tað dagliga arbeiðið á skúlabókasøvnunum annars verður gjørt av skúlabókavørðum skúlans,

4. - at lagdar verða kostnaðarætlanir og tíðarætlanir fyri hvønn skúla sær,
Í hesum sambandi er vert at geva gætur, at álitið leggur upp til, at játtaðar verða **beinanvegin kr. 500.000 (2001)** soleiðis at tveir bókavørðir kunnu fara í holt við uppgávuna at skráseta bókastovnin á øllum vinnu- og miðnámsskúlunum. Hetta skal metast sum ein landskassaíløga til tess at koma í gongd við arbeiðið beinanvegin,

5. - at gjørd verður ein dagføringarætlan av skúlabókasavninum, sum er ein tilráðing til skúlaleiðsluna um, hvussu bókasavnið skal røkjast.

*Hvussu kunnu broytingarnar fremjast?*

Áðrenn til bar at leggja nakra ætlan av nøkrum slag, var neyðugt hjá arbeiðsbólkinum at gera sær greitt, hvussu nógv talan er um. Hvussu nógvir skúlar? (Skjal, 4), hvussu nógvar bøkur? Hvussu eru skúlarnir fyri fysiskt, fíggjarliga og fakliga?

Í teirri kanningini, arbeiðsbólkurin hevur gjørt, ber til at hóma, hvussu støðan í løtuni er í landsins vinnu- og miðnámsskúlum, tá tað snýr seg um skúlabókasavnsviðurskiftini. Niðurstøðan er stutt og greitt tann, at støðan er ikki góð. Her vantar nógv í, at vit kunnu siga, at vit eru á jøvnum føti við aðrar skúlar í okkara grannalondum – ið hvussu er tá ið tað snýr seg um skúlabókasavnsviðurskiftini. Arbeiðsbólkurin metir, at her er nóg mikið at tríva í, tað er bara at seta pening av, skipa arbeiðið og so at fara í gongd.

*Tíðarætlan og uppskot um broytingar í skipanini*

Av teimum vinnu- og miðnámsskúlunum, sum í løtuni eru í Føroyum, er tað bara ein, ið farin er í holt við at leggja verandi bókasavn inn í edv-skipanina hjá landsbókasavninum. Hinir skúlarnir hava allir bókasøvn, smærri og størri, summi teirra eru kortskrásett, onnur ikki. Men tað eru aðrir skúlar uttanfyri vinnu- og miðnámsskúlaskipanina, ið longu eru farnir undir at modernisera skúlabókasøvnini eftir leisti landsbókasavnsins, eitt nú Sjúkrasystraskúli Føroya og Fróðskaparsetur Føroya. Í næstum fer landsbókasavnið eisini undir at edv-skráseta skúlabókasavnið á Føroya Læraraskúla. Harumframt hevur landsbókasavnið hesi síðstu 4 árini skipað og edv-skrásett bókasøvn hjá 8 stovnum/feløgum í landinum.

Vert er at geva gætur í hesum sambandi, at vantandi dagføring av skráum - her verður serliga hugsað um bókasavnsskránna Mikromarc - kann skjótt gera eitt nýtt bókasavn bæði ófunktionelt og ótíðarhóskandi, hóast talan er um eina nýggja edv-skráseting. Tí verður staðiliga mælt til, at bóksasøvnini hava teirra skráir dagførdar, og at tey bókasøvn, ið ikki hava yrkislærdar bókavørðir knýttar at sær, syrgja fyri at fáa avtalu í lag við eitt bókasavn/ein bókavørð um tað bókasavnsteknisku síðuna av málinum.

Nøgdin av bókum svingar stórt sæð úr ongari í onkrum skúla upp í uml. 20.000 eintøk í Føroya Studentaskúla.

Tað er greitt, at skulu næmingar og lærarar fáa størri gagn av teirri íløgu, skúlarnir hava gjørt í bøkur, so mugu hesar skrásetast í einari telduskipan soleiðis, at tá ið avtornar ber til at leita eftir bókum í einum felagsdátugrunni, sum verður ritstjórnaður av landsbókasavninum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at sama telduskipan, sum verður brúkt í landsbókasavninum, verður brúkt í landsins vinnu- og miðnámsskúlum.

Roknast má við, at ein skúli við 20.000 bókum má brúka einar 8-9 mánaðir at fáa skil í á bókasavninum og at fáa bókasavnið edv-skrásett. Mett verður, at tað er sera umráðandi, at fáa bókastovnin gjøgnumgingnan, samstundis sum tilfarið verður edv-skrásett. Tvs. at støða verður tikin til eldri tilfar, um tað møguliga skal burturbeinast, ella verða verandi í bókasavninum. Roknað verður tá við, at tað er ein yrkisútbúgvin bókavørður, ið ger hetta arbeiðið saman við fólki á staðnum. – Mælt verður staðiliga til, at tá ið bókasavnið er edv-skrásett, gera skúlarnir eina avtalu við Landsbókasavnið ella við eitt bókasavn við yrkisútbúnum bókavørðum um framtíðar skrásetingartænastu av bókasavninum.

*Kostnaðarætlan*

Halda vit okkum til eitt bókasavn við uml. 20.000 bókum má roknast við, at tað fer at kosta uml. Kr. 200.000 at fáa hetta edv-skrásett. Íroknaðar í hesar útreiðslurnar eru skráir og onnur útgerð, tó ikki vanlig telduútgerð, (Skjal, 5).

Tá ið bókasavnið so er skipað á henda hátt, má roknast við viðlíkahaldsútreiðslum og rakstri av hesum virksemi á jøvnum føti við aðrar fakstovur í skúlanum, tí tað er sera umráðandi, at bókasavnið verður dagført alla tíðina, bæði tá ið tað snýr seg um innihald og skráseting.

Tað er ikki neyðugt hjá øllum skúlunum at seta yrkisútbúnar bókavørðir at reka bókasøvnini, men mælt verður til, at skúlarnir fáa í lag avtalur við bókavørðir/bókasøvn um at átaka sær serligar skrásetingaruppgávur - ella at her verður samstarvað við eitt bókasavn við yrkisútbúnum bókavørðum.

Nevnast kann her, at tað er heilt vanligt í grannalondunum at hava yrkislærdar bókavørðir frá tí lokala bókasavninum nakrar tímar um vikuna. Hesir arbeiða so í neyvum samstarvi við skúlabókavørðin, og hetta vísir seg at vera ein stórfingin vinningur bæði fyri skúlabókavørðirnar, sum fáa eitt eyka fakligt inntak og fyri ta lokalu bókasavnsskipanina, sum á henda hátt nógv betur kann fylgja við, tá tað snýr seg um ynski og tørv hjá næmingum og lærarum.

Her kundi verið umhugsað samstarv á øðrum økjum enn tí bókasavnstekniska, eitt nú í sambandi við bókasavnskunning fyri næmingum, uppgávuskriving, framsýningum og øðrum verkætlanum.

Mett verður, at ein skúli við 20.000 bókum fer at hava útreiðslur fyri uml. kr. 50.000 árliga, til tess at bókasavnið kann halda eitt nøkulunda bókasavnsfakligt støði. Í hesa upphædd er ikki roknað útreiðslur til bókakeyp, men útreiðslur til skráseting og menning av bókasavninum annars.

Av tí at vinnu- og miðnámsskúlabókasøvnini eru 14 í tali, at tey liggja spjødd um alt landið, og av tí at bókanøgdin, ið skal gjøgnumgangast, liggur upp á uml. 60.000, so fer henda umleggingin at taka sína tíð. Umhugsað eigur at verða, um tað ikki kundi verið roynt at fingið fatur í skrásetarum, sum kundu farið undir at viðgjørt hesi søvnini í eini handavending, so at alt arbeiðið varð gjørt innanfyri eitt tíðarskeið upp á t.d. tvey ár. – Í hesum sambandi kundi verið søkt eftir tveimum bókavørðum, sum átóku sær uppgávuna undir leiðslu av landsbókasavninum.

*Eftirútbúgving*

Mælt verður eisini til at geva lærarum í vinnu- og miðnámsskúlunum møguleika at fáa sær eftir- og meirútbúgving, so at hesir eru betri førir fyri at røkja uppgávurnar sum skúlabókavørðir við skúlarnar. Dentur eigur at verða lagdur bæði á tann bókliga partin og á tann partin, sum viðvíkur tí kunningartøkniliga. Í hesum sambandi er vert at hyggja at skipanini við útbúgving av skúlabókavørðum fólkaskúlans - og møguliga at umhugsa at útbyggja hesa eftirútbúgvingarskipan við einum føroyskum innihaldi, og síðani leggja hesa eftirútbúgving inn undir skeiðvirksemið hjá Føroya Læraraskúla ella Fróðskaparsetri Føroya. Vert er í hesum sambandi at geva gætur, at kunningartøkni og bókasavnstøkni eru í dag ófrávíkiliga samantengd, og at tað tí krevjast heilt

onnur førleikakrøv hesum viðvíkjandi til dagsins skúlabókavørð, enn tað kravdist fyri bara 3-4 árum síðan.

*Nýbyggingar og umbyggingar*

Greitt er, at skal bókasavnstænastan á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum setast í verk, soleiðis sum hetta álitið mælir til, so skal í komandi tíðum gerast ein stór íløga bæði í skúlunum og í teimum virkandi bókasøvnunum í landinum. Nógvur peningur hevur hesi síðstu árini verið veittur til kunningartøkni, og her kann man so siga, at tann parturin av kunningartøknini, sum eitur nútímans bókasavnstænasta, hevur higartil stórt sæð verið við sviðusoð. Tey seinastu árini er KT ikki bara proppað inn í teir gomlu skúlabygningarnar í landinum, tí tað hevur verið av so stórum týdningi fyri menningina osfr. Men KT er eisini komið inn í tær mongu fíggjarætlanirnar sum nakað nýtt, og kanska hevur ikki altíð verið so gott samband ímillum tað, sum var, og tað, sum koma skuldi - nettupp tí at bókasavnsviðurskiftini í skúlunum hava verið so óskipað. Í sambandi við bókasavnsmálið skerst ikki burtur, at pláss skal til, nógv pláss, bæði fysiskt og ikki um at tala í fíggjarætlanunum. Talan verður um umbyggingar og nýbyggingar av bókasavnshølum. At hetta kostar pening, er púra greitt.

Uppskot okkara er, at tað almenna yvir eitt tíðarskeið upp á 5 ár setir av 1.5 til 2 milliónir til hvønn skúla sær til umbygging og tillaging av skúlabókasavninum á staðnum. Í alt svarar hetta til 21-28 milliónir kr. tey næstu 5 árini. Hetta er ein íløga í framtíðina, sum ikki kemst uttanum, skulu okkara skúlar lúka tey krøv, ið nútíðarsamfelagið ásetir við øllum sínum KT-politikki og sínum námsfrøðiligu verkætlanum.

Til tess at stýra hesari útbygging kundi Bókastovan, sum fólkabókasavnslógin frá 1988 (grein 11) leggur upp til verður sett á stovn, verið ráðgevi hjá landsarkitektinum.

*Niðurstøða og tilmæli*

Á teimum 14 skúlunum eru, sum áður sagt, uml. 60.000 bøkur. Bara ein lítil partur av øllum hesum er skrásettur eftir bókasavsskipanini, og ein uppaftur minni partur er edv-skrásettur í samstarvi við Føroya Landsbókasavn. So bara á hesum økinum liggur ein stór uppgáva at fáa frá hondini.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at øll bókasøvnini í landsins vinnu-og miðnámsskúlum av rationellum orsøkum fara at brúka ta somu edv-skrásetingarskipanina, sum landsbókasavnið og øll fólka- og skúlabókasøvnini í Føroyum brúka, soleiðis at talan bara verður um eina og ta somu skrásetingarskipanina til øll landsins bókasøvn. Av tí at mett verður, at tað er sera umráðandi at fáa gjøgnumgingið og edv-skrásett tann bókastovn, sum í løtuni er á øllum hesum skúlum, er arbeiðsbólkurin av teirri fatan, at alt hetta tilfarið eigur at verða edv-skrásett og gjøgnumgingið skjótast gjørligt.

Mælt verður til, at hetta arbeiði verður gjørt undir leiðslu landsbókasavnsins, og at játtaðar verða kr. 500.000 til endamálið beinanvegin (t.e. í fíggjarárinum 2001). Hesin peningur skal brúkast til at løna tveimum bókavørðum í eitt ár, soleiðis at skjøtil verður settur á skrásetingina av grundbókastovninum í skúlunum. Arbeiðsbólkurin metir, at tað hevur alstóran týdning, at alt hetta tilfarið verður skrásett skjótt, væl og einsháttað, soleiðis at sleppast kann víðari í tilrættisleggingini av bókasøvnunum í vinnu- og miðnámsskúlum landsins.

Kanning okkara (Skjal 2, 3,a) vísti, at støðan í síni heild í miðnámsskúlunum er vánalig og enn verri er hon í vinnuskúlunum. Allir skúlarnir ynsktu at fáa skipað viðurskifti á bókasavnsøkinum. Nakrir vístu eisin á tørvin á betri pláss til næmingar og lærarar at arbeiða á skúlanum, aðrastaðni verður hetta hugtakið nevnt *open learning centers*. Á føroyskum kunnu vit kalla hetta *lestrar- og vitanardeplar*.

Lutfalsliga lætt er at vísa á bráðfeingis tørvin á sakkønari hjálp til skráseting. Allar bøkur ella undirvísingarmiðlar skulu skrásetast eftir tí leisti, sum Føroya Landsbókasavn er í holt við í løtuni. Síðan verða hesar skrásetingar samskipaðar og lagdar út á internetið, so at brúkarin/lánarin kann síggja, *hvat* tilfar er tøkt, og *hvar* tilfarið er tøkt.

Tørvurin á sakkønari hjálp til dagliga raksturin er eitt sindur torførari at lýsa. Eitt nútímans skúlabókasavn er, sum áður sagt, nógv meira enn eitt savn av bókum.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at gjørd verður ein reglugerð um, hvussu samstarvið ímillum verandi bókasavnsskipan og vinnu- og miðnámsskúlabókasøvnini eigur at vera, tí ikki slepst uttanum, at her má tann bókasavnstekniski og tann pedagogiski parturin samskipast. Spurningurin er síðani, hvussu hetta verður gjørt á skynsamiligasta hátt. Í hesum sambandi er vert at vísa á, at bæði Føroya Landsbókasavn, Býarbókasavnið í Havn og Klaksvíkar Bókasavn hava, sum er, bygt upp eitt samstarv við onnur bókasøvn. Henda skipanin kundi verið endurskoðað og útbygd.

Arbeiðsbólkurin ger við hesum vart við, at tað er av avgjørdum týdningi, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið ger kunngerðir í samstarvi við avvarðandi skúlar/yrkisfeløg, sum áleggja skúlunum at skipa fyri bókasavnstænastu á skúlunum, og ikki minst at Undirvísingar- og Mentamálastýrið er sinnað at finna pening til tað, tað kostar at byggja upp eina nútímans skúlabókasavnstænastu í føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum. Hetta eru fortreytirnar! Alt annað er bara føgur orð, og tey kunnu í veruleikanum ikki brúkast til so nógv.

Lestrar- og vitanardeplar kosta pening, men talan er um eina íløgu, sum kaštar av sær í framtíðini, serliga tá ið hugsað verður um, at vitan verður kappingarparametrið burturav í framtíðarinnar kunningarsamfelagi.

**Skjal 1,a**

UNDIRVISINGAR- OG MENTAMÁLASTÝRIÐ
VINNU-/MIÐNÁMSDEILDIN

**Dagfesting:** 13. apríl 2000
**Tygara ref.:**
**Skrátal:** 44001/1
**Máltal:** 000053/3/VJ

Martin Næs
Føroya Landsbókasavn
J. C. Svabosgøta 16
100 Tórshavn

KOMIÐ
14 APR. 2000
Føroya Landsbókasavn

Undirvísingar- og Mentamálastýrið fer við hesum at heita á teg at gerast limur í ein arbeiðsbólk, ið skal kanna bókasavnsviðurskiftini á vinnu- og miðnámsskúlunum og gera uppskot til, hvussu hesi viðurskifti kunnu skipast við atliti at tørvi brúkarans og framtíðarmenning.

Ætlanin er, at nevndin skal vera liðug við sítt arbeiði 15. juni 2000, soleiðis at Undirvísingar- og Mentamálastýrið ítøkiliga kann taka støðu til, hvussu ein framtíðarætlan kann leggjast til rættis.

Formaður í nevndini er Martin Næs, landsbókavørður, og skrivari er Jákup Thorsteinsson. Formaðurin innkallar til fyrsta fundin, og nevndin skipar sjálv fyri sínum arbeiði.

Hjálagt er "Arbeiðssetningur fyri arbeiðsbólkin, ið skal kanna og gera uppskot um bókasavnsviðurskiftini á vinnu- og miðnámsskúlaøkinum".

Tú verður vinarliga biðin um at siga Undirvísingar- og Mentamálastýrinum frá í seinasta lagi 14. apríl 2000, um tú kanst vera limur í nevndini.

Vinarliga

Claus Reistrup

Skjal 1,a

## Arbeiðssetningur fyri arbeiðsbólk, ið skal kanna og gera uppskot um bókasavnsviðurskiftini á vinnu- og miðnámsskúlaøkinum

Til tess at tryggja eina góða og tíðarhóskandi atgongd til bókasavn/miðlasavn á øllum vinnu- og miðnámsskúlum og í nærumhvørvinum hjá hesum skúlum, verður við hesum settur ein arbeiðsbólkur, ið skal kanna verandi bókasavnsviðurskifti og gera uppskot til framtíðarhóskandi broytingar í verandi skipan, serliga við atliti at nýtslu av nýtøkni.

**Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum er at**

1. kanna
- hvussu verandi bókasavnskipan virkar á øllum vinnu- og miðnámsskúlum
- ítøkiliga tørvin á teimum ymsu skúlunum
- hvørji ynski skúlarnir hava í løtuni
- hvat teir ymsu skúlarnir hugsa um framtíðina innan bókasavnstænastu
- hvussu ein felags telduskrásetan kann gerast
- hvussu eitt felags føroysk leitanar- og lánsskipan kann skipast
- møguleikarnar fyri rationalisering av útláninum, t.d. kort við strikukodu til allar næmingar.

2. meta um
- tørvin á sakkønari hjálp, bæði við atliti at verandi skipan og við nýtslu av nýggjastu kunningartøknini á økinum.

3. áseta
- minstukrøv til nútímans bókasavnstænastu á vinnu- og miðnámsskúlunum við støði í kanningini.

4. gera uppskot til
- hvussu broytingar kunnu fremjast, gera tíðaætlan fyri broytingar og skrásetan av bókum, umframt eina kostnaðarætlan.

Í arbeiðsbólkinum sita hesi:
Bo Warberg, handilsskúlalærari, handilsskúlarnir
Hendrik Dahl, studentaskúlarnir og Hf-skeiðini
Óli Olsen, lærari, maritimu skúlarnir
Claus Reistrup, undirvísingarleiðari, Vinnu- og Miðnámsdeildin
Jákup Thorsteinsson, samskipari, Mentamáladeildin
Martin Næs, landsbókavørður

Formaður í nevndini er Martin Næs, landsbókavørður, og skrivari er Jákup Thorsteinsson, samskipari.

Skjal 1,b

FLB
Føroya Landsbókasavn
*The National Library of the Faroe Islands*
J. C. Svabosgøtu 16 • Postboks 61 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 16 26 • Fax 31 88 95 • Teldupostur: *fonalib@flb.fo* • Heimasíða: *http://www.flb.fo*

Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegi 72
Box 3279
110 Tórshavn

Skjal 1,b

Tórshavn, 4. juli 2000

**Frágreiðing frá arbeiðsbólkinum ið settur er at gera tilmæli um bókasavnstænastuna á føroysku vinnu- og miðnámsskúlunum**

Arbeiðsbólkurin vil við hesum boða Undirvísingar- og Mentamálastýrinum frá, at vit enn ikki eru liðug at viðgera málið, tó eru vit komin so mikið væl áleiðis, at vit meta at eitt álit er liðugt skrivað umleið 25. august í ár.

Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt 6 fundir, vit hava viðgjørt støðuna á økinum í løtuni, og vit hava kannað hvussu støðan er á teimum einstøku skúlunum, hvørji ynski teir hava um broytingar, og hvørji ynski tann pedagogiski myndugleikin – bæði í Føroyum og aðrastaðni hevur til nýtímans bókasavnstænastu á vinnu- og miðnámsskúlum.

Stutt sagt er arbeiðsbólkurin komin til eina fyribils niðurstøðu, sum kann orðast soleiðis: støðan á økinum er vánalig.

Spurningurin er, hvussu vit við verandi karmum – bæði fíggjarligum og fysiskum - fáa bøtt um støðuna, soleiðis at bæði næmingar, lærarar og samfelagið í síni heild eru hampuliga væl fyri, tá ið tað snýr seg um at gera brúk av teirri vitan og teimum hentleikum, sum eiga at finnast á einum nýtímans skúlabókasavni á vinnu- og miðnámsskúlunum í landinum.

Kanning okkara vísir, at á teimum 12 skúlunum eru í løtuni umleið 50-60.000 bøkur. Bara ein lítil partur av øllum hesum er skrásettur eftir bókasavnsskipanini, og ein

uppaftur minni partur er edv-skrásettur í samstarvi við Føroya Landsbókasavn. – So bara her liggur ein stór uppgáva at fara undir.

Í álitinum fara vit at mæla til, at øll bókasøvnini á landsins vinnu- og miðnámsskúlum av rationellum orsøkum fara at brúka ta somu telduskrásetingarskipanina, sum Landsbókasavnið og øll fólkabókasøvnini í Føroyum brúka, soleiðis at talan bara verður um eina og ta somu skrásetingarskipanina til øll landsins bókasøvn. Av tí at mett verður, at tað er sera umráðandi at fáa gjøgnumgingið og edv-skrásett tann bókastovn, sum í løtuni er tøkur á øllum hesum skúlum, er arbeiðsbólkurin av teirri fatan, at alt hetta tilfarið eigur at verða edv-skrásett og gjøgnumgingið skjótast gjørligt.

Mælt verður til at hetta arbeiði verður gjørt undir leiðslu Landsbókasavnsins, og at játtaðar verða kr. 500.000,- til endamálið fíggjarárið 2001. Hesin peningur skal brúkast at løna tveimum bókavørðum í eitt ár.
Arbeiðsbólkurin metir at tað hevur sera stóran týdning, at alt hetta tilfarið verður skrásett skjótt, væl og einsháttað, so at skil skjótt kann fáast á bókasavnsviðurskiftunum á okkara vinnu- og miðnámsskúlum.

Arbeiðsbólkurin leggur áherðslu á, at tað er av umráðandi týdningi, at edv-skrásetingin av øllum hesum bókunum verður gjørd so skjótt sum gjørligt og um alt landið, so at allir skúlarnir koma við í skipanina so gott sum samstundis.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið eigur tí at seta kr. 500.000,- av til endamálið fíggjarárið 2001, soleiðis at sleppast kann í gongd við at fáa skil á á hesum viðurskiftunum.

Fíggjarárini 2002, 2003, 2004 og frameftir má roknast við, at henda upphædd verður hægri, skulu vit rokna við at hava eina nýtímans bókasavnstænastu á okkara vinnu- og miðnámsskúlum.

Vinarliga
vegna arbeiðsbólkin

Martin Næs
form.

**Skjal 2**

Skjal 2

Bókasavnsnevnd
Tórshavn, 9. mai 2000

SE, FS, MS, KL-HK, FHK, FHH, TSK, TST, FIV, Sjóvinnusk. í Klaks, Maskinmeistaraskúlin, Sjómansskúlin

att. rektarin/skúlastjórin

**Viðvíkjandi bókasøvnum á vinnu- og miðnámsskúlunum**

Undirvísingar- og Mentamálastýrið setti 13. apríl 2000 ein bólk at kanna bókasavnsviðurskiftini á vinnu- og miðnámsskúlunum við atliti at at nútímansgera veitingarnar, sum eitt bókasavn skal røkja. Her verður millum annað hugsað um yvirlits- og leitingarskipanirnar eins og um bókasavninið sum kunningar- og læringarmiðdepil.

Í arbeiðsbólkinum, ið skal vera liðugt við sínum arbeiði hálvan juni 2000,sita hesi:
Bo Warberg, handilsskúlalærari
Hendrik Dahl, studentaskúlalærari
Óli Olsen, fyrrverandi sjómansskúlalærari
Claus Reistrup, undircísingarleiðari
Jákup Thorsteinsson, samskipari
Martin Næs, landsbókavørður

Arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund mánadagin 8. mai, og gjørdi hann av at biða allar vinnu- og miðnámsskúlar svara hesum spurningum, soleiðis at bólkurin fær eina mynd av bókasavnstørvinum á teimum ymsu skúlunum eins og av framtíðarhugsan skúlanna hesum viðvíkjandi.

Arbeiðsbólkurin vil fegin hava lýst hesi viðurskifti á skúla tykkara:
1. hvussu nógvar bøkur eru á bókasavni skúlans?
2. hevur skúlin ein fastan persón, sum røkir bókasavnið?
3. hevur viðkomandi, som røkir bókasavnið, eina útbúgving ella eftirútbúgving við atliti at bókasavnsarbeiði?
4. hvussu nógvar tímar um vikuna er bókasavnið opið?
5. nøktar bókasavnið í løtuni tørvin hjá lærarum og næmingum?
6. um nei, hvat kundi skúlin ynskt sær beinanvegin av broytingum?
7. hvørji ynski hevur skúlin til bókasavnið á skúlanum og til veitingar, sum eitt bókasavn skal bjóða kundunum?
8. hvørjar ætlanir kundi skúlin hugsað sær fram innan bókasavninum á skúlanum?

Skúlin er vælkomin at gera ískoytisviðmerkingum til spurningarnar.

Biðið verður um, at skúlin sendir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum svar uppá hesar spurningar í seinasta lagi 18. mai 2000.

Vinarliga

**Skjal 3,a**

Skjal 3,a

| Skúli | 1. Bøkur | 2. Fast fólk á bókasavni | 3. Útbúgv bókavørð | 4. Opið | 5. Tørvur nøktaður? | 6. Broytingar | 7. Ynski, veitingar | 8. Ætlanir við bókasavninum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tekniski Skúlin í Tórshavn | | Hevði áður minni savn og parttíðar bókavørð | | | Skúlin hev. einki bókasavn í løtuni | Stórt ynski, at skúlin fær eitt bókasavn | Samskipast við eina "internet kafé" so næm. og lær. kunnu nýta bøk. og elektronisku hentl. | Vónandi verða hesi viðurskiftini og ynskini viðgjørd sum skjótast |
| Tekniski skúlin í Klaksvík | 1000 | Nei, fleiri ferðir biðið um tað | Nei | Ógreitt Tørvur 4 t/vikuna | Nei, ikki at liva við fyri lærar. og næmingar | Serl. játtan til bókasavn, uml. kr. 60.000 árliga | Sí pkt. 4 og 6. Tað er skúlans ynski, at vit fáa hóskandi høli og eina rímiliga vegleiðing og tænastu | Fáa vit fígging til fløgu og rakstur, so er ætlanin sjálvandi at skipa eitt bókasavn |
| Fiskivinnu-skúlin í Vestmanna | 500 | Nei | Víst verður til svar 2 | Næm. fáa lykil til læst kamar | Nei | Úrvalið av bókum alt ov lítið. Karmarnir alt ov trongir og ótíðarh. | Størri úrval av bókum, tíðrritum, fløgum o.ø. Lønt starvsfólk og fastar upplatingartíðir | Meiningsleyst at svara spurninginum við verandi umstøðum |
| Klaksvíkar Sjómans-skúli | 100 Ikki bókas., men goymsla | Á skúlanum er ein persón, sum tekur sær av bókunum | Nei | Bert eftir tørvi | Bóka-goymslan nøktar ikki tørvin | Fleiri bøkur og at fáa skipað viðurskifti á økinum | At miðsavna allar bøkur, sum eru viðkomandi til eina skipara- og kokkaútbúgving | Høli til endamálið, at skaffa viðkomandi bøkur, at gera okkum eina skipan til at halda skil á bókunum |
| Føroya Sjómans-skúli | ? | Nei. Einki bókasavn er á skúlanum. | | | | Í samb. við útbygging eru rúmlig høli sett av til bókasavn | At bókasavnið kemur at virka sum eitt "Open Learning Center" við on -line skipan við FLB og onnur bókasøvn | At bókasavnið gerst miðpunkt fyri mongu verkætlanum skúlans við at veita bókliga og elektroniska hjálp |
| Maskin-meistara-skúlin | Skúlin eigur 2000 bøkur | Nei. Einki bókasavn er á skúlanum | | | | | Opið frá 14.30 til 15.30 Heldur teknisk tíðarrit Bøkur og tíðarrit skrásett á teldu. Bóka-vørður hava útbúgving | Skúlin hevur góð høli og hillar, men hevur ikki pening til at seta skipanina í system. Annarsa svarað áður. |

| Skúli | 1. Bøkur | 2. Fast fólk á bókasavni | 3. Útbúgv bókavørð | 4. Opið | 5. Tørvur nøktaður? | 6. Broytingar | 7. Ynski, veitingar | 8. Ætlanir við bókasavninum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Før.Student og HF í Hoydølum | 18.000 | Ja, tveir. 6 løntímar í part | Ja, biblioteks pædagog. | 17 t. og 10 m/ vikuna | Ja, samb. kanning | Eina stovu afturat til "arbeiðspláss" Opið longri | Alt tilfar miðsavnað. Meira pláss til arbeiðsbólkar | Alt tilfar telduskrásett. Útlán mekaniserað sum aðrastaðni |
| Miðnámsskúlin, Vágur | 11.100 | Nei, gongur upp á skift yvir áramál | Einans hana, nomið á hægri lest. | Minst 10 tímar um vikuna | Nei, tað kann ikki sigast | Góð og stór høli. Teldur og ymsar hentl. Skrásetingskipan sum FLB | Góð, egnað høli. Bókasavnið partur av einum námsverkstaði. Fleiri bøkur, teldur, hentleikar | Samanber svarini til sp. 6 og 7 |
| Studenta - skúlin á Kambsdali | 6000 (minst) | Ja, tveir | Ja, annar, skeið frá Odense Universit. | 22 tímar um vikuna | Nei, ikki einsamalt, eisini FLB og Landsmið | Ongar bráðfengis broytingar eru neyðugar á bókasavni skúlans | Størri játtan til bókakeyp, betri hølir og fleiri hillar. On-line skipan við FLB og LM. Fleiri tímar betri tænastu | Nýggja teldu við mikromarcskipan. Skráseta bøkurnar til telduavlesing við strikukodum |
| Klaksvíkar HF-skeið | 4.500 | Ja | Nei | 10 tímar | Nøkulund Eisini bókasavn í býnum | | Elektroniska skráseting, ið er í gongd í løtuni. Størri úrval av før. og donskum bókum | Størri høli til bókasavn. Ítøkilig ætlan er gjørd |
| Føroya Handilsskúl Tórshavn | ? | Ja, Bo Warberg | Nei | 4 tímar | Nei, prob. med regis af bøger ved nyt edb-syst. | Opdatering af Mikromarc og ny registrering af alle skolens bøger | Afturat punkt 6: længere åbningstider. Hvis behov, så større datamaskiner. Øremærkning af midler til bibliot. | Passende lokale, søge info på nettet, samarb gennem FLB, fælles lånerkort, samme regler. Uddannelse |
| Føroya Handilsskúl Kambsdalur | 2000 | Ja, hann fær ein tíma um vikuna | Nei | Alt samdøgurið | Nei, tørvurin er als ikki nøktaður | Íløgu í eina skrásetingarskip. (útlán/innlán). | Betri trygdarskipan, atgongd til bókasøvn úti og heima. At FLB gevur betri og skjótari veitingar til okk. næm. | Vit ynskja eina økta játtan til bókakeyp. Best, um keyp av bókum kom undir játtanina til útgerð |

Skjal 3,b

Skjal 3,b

26

# Krav til HardWare

# Mikromarc 2 Client

## Hardware-krav til client i Mikromarc 2.0

### Introduktion

MikroMARC 2, som er et helt moderne bibliotekssuite, der bygger på databasen SyBase SQL AnyWhere samt helt nye udviklingsværktøjer.

MikroMARC 2 er et rent Windows-produkt, som bliver programmeret til den såkaldte 32-bit-platform. Det betyder konkret at MikroMARC 2 kun vil kunne køre under Windows 95 el. Windows NT på Clienterne / PC'erne.

På server-siden har man fortsat mulighed for at anvende Novell, Windows 95 el. Windows NT.

Vi kan derfor anbefale, at man allerede nu ved nyanskaffelser af PC'ere tager højde for denne udvikling og køber PC'ere med Windows 95 el. NT-workstations. Dette betyder konkret at en PC bør have. "Ældre" 386-baserede PC'ere med 1-4 MegaByte RAM **ikke** vil være velegnede til MikroMARC 2

Der vil fortsat være vedligehold og support på MikroMARC 1.7x, som fremover bliver "den gamle DOS-platform". De der vælger at basere sig på DOS / Windows 3.1x vil fortsat kunne beholde det kendte MikroMARC.

Disse krav gælder blot PC'erne. Man kan uden videre beholde sit eksisterende netværk (fx Novell 3.11 eller Windows NT).

For Mikromarc WebCat WWW-server gælder mere specifikke krav.

### Hardwarekrav til en Client-PC med Udlån 2

- Minimum 16 MegaByte RAM (24 MB RAM anbefalet)
- Min. 166 MegaHertz CPU
- Min. 486 - CPU
- 500 MB Harddisk

### Hardwarekrav til en Client-PC med Katalog 2 & Indkøb

- Min. 64 MegaByte RAM (96 MB RAM anbefalet)
- Min. 200 MegaHertz
- Min. Pentium CPU
- 1 GigaByte hurtig harddisk

# Krav til HardWare

# WebCat Server

## Mikromarc WebCat WWW-server kører på Windows NT med Internet Information Service.

### Introduktion

Mikromarc biblioteksystems produktfamilie includerer et egentligt World Wide Web modul. Alle eksisterende Mikromarc-kunder kan derfor gøre deres databaser globalt tilgængelige via standard Web-browsere som Microsoft Explorer og Netscape.

Dette betyder, at også MAC-Computere samt grafiske UNIX-stationer kan få adgang til søgning på bibliotekets database. For søge-clienter gælder kun at de skal kunne køre en standard www-browser.

Mikromarc WWW benytter Mikromarc 2 database-struktur som kører på Sybase SQL Anywhere.

Vær opmærksom på at Webcat også kan køre på Microsoft Personal Webserver på Windows 95/98 eller Windows NT Workstation - som server.

### Krav til Server

- Microsoft NT 3.51, 4.0 og 5.0
- Microsoft Internet Information Server (IIS) version 4.0 skal være installeret - er en del af Server-standardpakken. Vi anbefaler at man bruger servicepack 4 evt. sp5.
- Index-søgning - browse i Webcat forudsætter at IIS version 4.0 er installeret - ellers er det fint nok med IIS version 3.0.
- Min. 128 MB Ram
- Min. 250 MegaHerz Pentium CPU
- Min. 1 GigaByte SCSI harddisk
- Vær opmærksom på, at Webcat ikke fungerer (for some reason??) i kombinationen: ServicePack4 og Microsoft Internet Information Server v 3.0. Derfor skal IIS 4.0 installeres før ServicePack4. IIS 4.0 ligger i NT OptionPack 4.0. Hvis man vælger at anvende ServicePack4 skal man derfor først installere OptionPack 4.0. Vær opmærksom på at næste version af Webcat med index-browse forudsætter IIS 4.0.

© 2000:2002 Mikromarc Danmark. Ansvarlig redaktør: Hans Erik Büscher. Udgiver: Mikromarc Danmark, Læderstræde 15, DK 1201 København K. Tlf: +45 70 20 12 12. Fax: +45 33 16 04 40.

Skjal 4

# *Adressur hjá skúlum*

## *Skúlar*

Føroya Studentaskúli og HF-skeið
Hoydalar
100 Tórshavn
Tlf: 312973 Fax: 318624
Heimasíða: http://www.sleipnir.fo/skular/Hoydalar/

Studentaskúlin og HF-skeiðið
í Eysturoy
530 Fuglafjørður
Tlf: 444024 Fax: 444797
Heimasíða: http://www.shey.olivant.fo/main.htm

Studentaskúladeildin í Suðuroy
900 Vágur
Tlf: 373622 Fax: 374026
Heimasíða: http://www.midnam,fo

Klaksvíkar HF-skeið
Klaksvíksvegur
700 Klaksvík
Tlf: 456412 Fax: 457412
Heimasíða: : http://www.shey.olivant.fo

Føroya Handilsskúli í Tórshavn
Marknagilsvegur 77
100 Tórshavn
Tlf: 317177 Fax: 313374
Heimasíða: http://www.hsh.fo/

Føroya Handilsskúli á Kambsdali
530 Fuglafjørður
Tlf: 444900 Fax: 444901
Heimasíða: http://kambsdal.olivant.fo/

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75
100 Tórshavn
Tlf: 311957 Fax: 316621
Heimasíða: http://www.tst.fo

Tekniski Skúlin í Klaksvík
Nýggivegur
700 Klaksvík
Tlf: 456311 Fax: 457311
Heimasíða: http://tsk.olivant.fo/

Fiskivinnuskúlin
350 Vestmanna
Tlf: 424496 Fax: 424428
Heimasíða: http://www.shey.olivant.fo/main.htm

Føroya Sjúkrasystraskúli
Eirargarður 14 B
100 Tórshavn
Tlf: 316027 - 436 Fax: 313926

Klaksvíkar Sjómansskúli
Garðavegur 11
700 Klaksvík
Tlf: 457138 Fax: 457917

Húsarhaldsskúli Føroya
Stoksoyrarvegur
700 Klaksvík
Tlf: 456974 Fax: 456974

Føroya Fólkaháskúli
Háskúlavegur 14
100 Tórshavn
Tlf: 311743 Fax: 319687
Heimasíða: http://www.sleipnir.fo/skular/haskuli/

Føroya Sjómansskúli
Nóatún
100 Tórshavn
Tlf. 31 17 49 Fax 31 81 22

**Skjal 5**

FLB

Føroya Landsbókasavn
*The National Library of the Faroe Islands*
J. C. Svabosgøtu 16 • Postboks 61 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 16 26 • Fax 31 88 95 • Teldupostur: *fonalib@flb.fo* • Heimasíða: *http://www.flb.fo*

Føroya Læraraskúli
Pauli Nielsen, rektari
Frælsið 20
100 Tórshavn

Skjal 5

LJÓSTAK

Tórshavn, 25/3-2000

Bókasavnið

Áðrenn farið verður undir edv-skráseting av bókasavninum á Læraraskúlanum verður mælt til,

- at lúkað verður úr søvnunum,
- at bøkurnar verða settar upp í hillar,
- at frámerki verður sett í bøkurnar, so tað týðiliga sæst í hvørjum sersavni tær skulu standa,
- at tey einstøku sersøvnini fáa teirra sjálvstøðuga heitið, t.d. Tónleikastovan, Lívfrøðistovan, Lærarastovan, Rektarin osfr.

Krøv til edv-útgerðina. Sí hjáløgdu pappír frá Mikromarc.

Mettur kostnaður:

| | |
|---|---|
| Tær ymisku edv-skráirnar og at leggja tær inn, uml. | kr. 20.000,- |
| Grindlalesari á | - 3.900,- |
| Bonprentari á | - 5.225,- |
| Grindlar, 20.000 stk (Føroya Læraraskúli) | - 20.000,- |
| At edv-skráseta bókasavnið verður mett at taka 7 mánaðir hjá einum bókavørði | - 140.000,- |
| Aðrar útreiðslur uml. | - 5.000,- |
| Ætlaðar útreiðslur í alt | **kr. 194.125,-** |

Vit taka sum givið at Læraraskúlin hevur útvegað sær brúkiliga telduútgerð til bókasavnið.
Vit kundu hugsað okkum at farið varð í gongd við uppgávuna í juni, soleiðis at vit verða liðug við setningin um ársskiftið. Tá ið skrásetingin er gjørd, vilja vit eisini mæla til, at Føroya Læraraskúli til ta tíð umhugsar at fáa partvíst settan, útbúnan bókavørð at taka sær av savninum saman við øðrum.

Við heilsan
FØROYA LANDSBÓKASAVN
Martin Næs
Martin Næs